

# Frá heilsølu til beinleiðis handil

Jógvan Weihe byrjaði við egnari heilsølu í kreppuárinum 1991. Hølini vórðu leigaði, og var tað serliga fiskireiðskapur, ið miðað var eftir at selja. Í 2004 flutti fyritøkan í egin hølir, og valdu teir tá at saðla um, til meira at vera ein handil, ið selur beinleiðis til kundan. Tó er eitt sindur eftir av heilsøluvirkseminum. Kemur man á gátt hjá Jógvan Weihe, fær man at síggja ein rættuliga fjølbroyttan frítíðarhandil. Millum annað kann man fáa til keyps; vinnulig- eins væl og frítíðar fiskiamboð, útgerð til urtagarðin, camping, frítíðarklæðir og vanlig arbeiðsklæðir. Eisini fáast búrsur, til fugl og seyð. Ja av sonnum ein fjølbroyttur handil. Seinnu árini hava synirnar hjá Jógvani tykið yvir so smátt, og reka hesir fyritøkuna í dag. Um nakar skuldi ivast, hvar hesin spennandi handil er, kann nevnast, at hann liggur á Stiðjagøtu, ið er ein av síðugøtunum á Velbastaðvegnum.


























